# Bókanýtt

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

## Tema við slankum

**Sólrun Michelsen hevur skrivað bók, sum bæði er roknað vaksnum og ungum, men sum enn í høvuðsheitum tekur støði í barnsins verð**




Sólrun Michelsen hevur í fleiri ár gjørt vart við seg sum barnabókarithøvundur. Nú hevur hon skrivað eina bók, sum bæði er roknað vaksnum og ungum, men sum enn í høvuðsheitum tekur støði í barnsins verð. Tað eru barnaeygu, sum síggja og eygleiða bæði fjálgar og ófjálgar hendingar í uppvøkstrinum. Sagt verður frá gentuni, sum er innilæst, um maskinuna hjá Fíu, um rentur og avdrag, um tað heita hjartað, um ommuna og mangt, mangt annað. Tær einstaku søgurnar eru bæði ein heild í sjálvum sær, men hanga um somu tíð saman sum perlur á strái.

Sólrun Michelsen: Tema við slankum. Føroyaprent legði til rættis, prentaði og bant inn. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út. 113 bls. kr. 180.

## Mín jólabók 2007

**Nú er hon komin: Jólabókin! Við vakrari permu og sum vant býtt upp í 24 partar við mynd av einum barni til hvønn partin**




Meðan vindurin blæsur um geilar og tún, og regnið dukar á vindeygað, hugna vit okkum heima, bæði stór og smá. Lesa eina søgu, gera jólaprýði, klippa og klistra, baka smákøkur og njóta jólini. Alt hetta kann jólabókin brúkast til.

Søgurnar í bókini, sum eru nýskrivaðar, hava allar okkurt við jól ella vetur at gera. Eisini hevur eitt kent, gamalt jólalag fingið føroyskan búna, og mínsann um ikki jólaeingilin, Lítli Gutti, er sloppin upp í part eisini.

Jólabókin hevur altíð verið eitt høvi hjá listafólki at royna seg fyrstu ferð. Í ár eru bæði gamlir kenningar og nýggj listafólk við, bæði sum teknarar og søguhøvundar.

So nú er bert eftir at renna oman í handilin at keypa jólabókina, og at bjóða jólunum vælkomnum.

Jólabókin í ár hevur grøna permu og er gylt við gulli.

Hon er innbundin og 88 bls., og so kostar hon bara 198 kr.




Hátíðarløta

Fiskamarknaður Føroya 15 ár

Í sambandi við at tað í ár eru liðin 15 ár
síðan Fiskamarknaður Føroya varð settur á stovn,
skipað núverandi feløgini, Landingarmiðstøð Føroya og Faroe Fishmarket fyri

hátíðarløtu á Toftum
týsdagin 27. nov. kl.14

har m.a. nýggi bóklingurin um søguna hjá Fiskamarknaði Føroya,
sum Óli Jacobsen hevur skrivað verður framlagdur
og okkurt gott verður til matna.

Øll eru hjartaliga vælkomin



Dansur á
Hotel Føroyum

Leygarkvøldið 24. november.
Faktor 4 við Jens Marna spælir til dans.

Hotel Føroyar ★★★★